

Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum saman við fyrsta flokkinum av aspirantum. Nú kemur nýggjur flokkur. Mynd Jan Müller

# Vinnuháskúlin dyrnar upp fyri nýggjum flokki av aspirantum

**Jan Müller**

11.12.2015 - 18:18

Oljan.fo

Tann 25. Januar byrjar nýggjur flokkur av aspirantum á Vinnuháskúlanum í Havn.

Nú teir fyrstu 11 aspirantarnir á Vinnuháskúlanum hava mynstrað og eru farnir í praktikk við føroyskum skipum á heimshøvunum, verða dyrnar aftur latnar upp fyri nýggjum aspirantum. Í dag er Vinnuháskúlin nevniliga  farin undir eina lýsingaherferð, har ljós verður varpað á, at ein nýggj aspirantútbúgving byrjar 25. januar næsta ár.

Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum er sera fegin um ta góðu byrjan, sum fyrsta liðið av aspirantum hevur fingið og vónar hann, at tað verður tikið væl ímóti hesi næstu royndini at útvega føroyskum ungdómi henda nýggja møguleikan at útbúgva seg til skipsførara.

Tað verður pláss fyri millum 10 og 15 aspirantnæmingum á nýggja flokkinum. Sí lýsingina á oljan.fo